


# *Samkomulag Þórshafnar og Faxaflóahafna sf. um kútterinn Westward Ho*

# *Avtalu millum Torshavn og Faxaflóahafna sf. um sluppin Westward Ho*

Fyri at víðka um samstarvið millum Ísland og Føroyar á mentanar- og ferðavinnuøkinum, gera Tórshavn og Faxaflóahafnir sf. sínámillum hesa

AVTALU:

1. Í 2010 sigldi sluppin, Westward Ho, frá Tórshavn til Akranes og Reykjavíkar í sambandi við Hátíð havsins fyrst í juni mánaða tað árið. Westward Ho er eitt træskip, smíðað í Grimsby í 1884. Sluppin er ogn hjá Tórshavnar Kommunu, men verður umsitin av einum felag, ið nevnist Sluppvinir. Vitjanin av sluppini vakti stóran ans og var eitt sera jaligt tiltak, har vinalag og skyldskapur føroyinga og íslendinga var týðiligt. Henda avtala er gjørd fyri at víðka um samband íslendinga og føroyinga og fyri at minna á merkisverda søgu og samstarv í sambandi við siglingar og fiskiveiðu.

2. Partarnir eru samdir um, at sluppin, Westward Ho, siglir til havnirnar hjá Faxaflóahöfnum sf. á Hátíð havsins árið 2012 og síðan triðja hvørt ár. Tórshavn og Faxaflóahafnir sf. fara tey árini, ið siglt verður, at tryggja stuðul til ferðina, upp til 70.000 DKK, javnt frá hvørjum parti.

3. Tá Westward ho siglir til Reykjavíkar og til Føroya, skal sluppin vera mannað av íslendingum og føroyingum. Roynt verður at hava kynslutfallið á manningini javnt. Um borð verður greitt frá slupptíðini í Føroyum og Íslandi, og eisini verður greitt frá, hvussu seglskip skulu siglast.

4. Móttøka av sluppini á havnarøkinum hjá Faxaflóahöfnum sf verður í tøttum samstarvi við Sjómannadagsráðið og Føroyingafelagið í Reykjavík. Tá sluppin vitjar í Reykjavík, verður dentur lagdur á at kunna um Føroyar, Tórshavn og føroyska mentan, og skulu partarnir í felag taka sær av at fyrireika kunningina. Samstundis sum sluppin vitjar, fer Faxaflóahafnir sf. at gera sítt til at halda søgurnar livandi um íslendskar træbátar og ta strandarmentan, ið teimum viðvíkur, við at bjóða træbátum og skipum í havnirnar hjá Faxaflóahöfnum sf.

5. Tá Westward Ho kemur til Tórshavnar, verður, í samstarvi við Tórshavnar Kommunu, Tórshavnar havn, Íslendingafelagið í Føroyum og fleiri øðrum, dentur lagdur á at kunna um Ísland og íslendska mentan, Reykjavík, Akranes og Borgarbyggð.

6. Eftir førimuni skulu partarnir í hesi avtalu í felag stuðla umsóknum frá Sluppvinum í Føroyum, ið tekur sær av rakstrinum av Westward Ho, um stuðul vegna hesa avtalu og stuðulsumsóknir vegna Hátíð havsins í sambandi við vitjan av træbátum og skipum á hátíðini.

Reykjavík 20. august 2011

Vegna Tórshavnar Kommunu

Heðin Mortensen, borgarstjóri

Vegna Faxaflóahafnir sf.

Hjálmar Sveinsson, nevndarformaður í Faxaflóahöfnum sf.

Gísli Gíslason, havnarmeistari

Váttan um rætta dagfesting
og undirritan partanna:

Til þess að auka samstarf milli Íslands og Færeyja á sviði menningar- og ferðamála þá gera Þórshöfn og Faxaflóahafnir sf. hér með sér eftirfarandi

SAMKOMULAG:

1. Árið 2010 sigldi kútterinn Westward Ho frá Þórshöfn til Akraness og Reykjavíkur í tengslum við Hátíð hafsins í byrjun júnímánaðar það ár. Westward Ho er kútter, smíðaður í Grimsby árið 1884. Kútterinn er í eigu Þórshafnar, en rekinn af félagi sem nefnist Sluppvinir. Heimsókn kúttersins vakti mikla athygli og var afar jákvæður viðburður þar sem vinátta og frændsemi færeyinga og íslendinga var í forgrunni. Samkomulag þetta er gert til þess að auka tengsl íslendinga og færeyinga og til þess að minna á merkilega sögu og samstarf á sviði siglinga og fiskveiða.

2. Aðilar eru sammála um að kútterinn Westward Ho sigli til hafna Faxaflóahafna sf. á Hátíð hafsins árið 2012 og síðan á þriggja ára fresti eftir það. Þórshöfn og Faxaflóahafnir sf. munu þau ár sem siglt er, tryggja að jöfnu framlag til siglingarinnar allt að 70.000 dkr. hvor aðili.

3. Á siglingu Westward Ho til Reykjavíkur og til Færeyja skal áhöfn kúttersins skipuð íslendingum og færeyingum. Leitast verður við að kynjaskipting í áhöfn verði jöfn. Um borð verði fræðsla um skútuöldina í Færeyjum og á Íslandi auk þess sem veitt verður fræðsla um siglingu seglskipa.

4. Móttaka kúttersins á hafnarsvæði Faxaflóahafna sf. verður í nánu samstarfi við Sjómannadagsráð og félag færeyinga á Íslandi. Með heimsókn kúttersins til Reykjavíkur verður lögð áhersla á að kynna Færeyjar, Þórshöfn og færeyska menningu, en aðilar munu sameiginlega annast undirbúning þeirrar kynningar. Samhliða heimsókn kúttersins munu Faxaflóahafnir sf. leggja sitt að mörkum til þess að halda á lofti sögur íslenskra trébáta og strandmenningu sem þeim tengist með því að bjóða trébátum og skipum til hafna Faxaflóahafna sf.

5. Við komu kútters Westward Ho til Þórshafnar verður í samvinnu við Þórshafnar, hafnarinnar í Þórshöfn, félag íslendinga í Færeyjum og fleiri aðila lögð áhersla á að kynna Ísland og íslenska menningu, Reykjavík, Akranes og Borgarbyggð.

6. Sem kostur er munu aðilar samkomulags þessa sameiginlega styðja umsóknir Sluppvina í Færeyjum, sem annast rekstur Westward Ho, um styrki vegna samkomulags þessa og styrkbeiðnir vegna Hátíðar hafsins vegna heimsókna trébáta og skipa á á hátíðina.

Reykjavík 20. ágúst 2011

F. h. Þórshafnar

Heðin Mortensen, borgarstjóri

F.h. Faxaflóahafna sf.

Hjálmar Sveinsson, formaður stjórnar Faxaflóahafna sf.

Gísli Gíslason, hafnarstjóri

Vottar að réttri dagsetningu og undirritun aðila: